

# ENN EITT SUMMAR, ENN EIN ÆVINTÝRAFERÐ

Fyri nógv børn er Ævintýraferðin vorðin ein fastur partur av summarinum. Hóast Ævintýraferðin bara hevur trý ár á bakið, so hevur undirtøkan verið so stór, at talan er um at vaksa um ævintýraferðina. Men lat okkum fyrst fáa alt uppá pláss – hvat er Ævintýraferðin, og hvør goymir seg aftanfyri hetta heitið?

SJÓN/TÓNLEIKUR
**Rókur Jákupsson Jakobsen**
**rokur@sosialurin.fo**

Teir sum mynda kjarnina í Ævintýraferðini eru Dánjal Dam á Neystabø og Búi Dam. Saman hava teir gjørt eitt tiltak, sum bæði inniheldur sjónleik og tónleik. Tiltakið er savnað undir heitinum Ævintýraferðin. Aðrir leikarar hava verið í leikinum m.a. Beinta Klotier og Hallur Johannesen. Í ár er Gunn Reinert við í Ævintýraferðini. Ævintýraferðin hevur seinasti trý árini ferðast kring alt landið. Hon hevur verið framførd í dagstovnum, á stevnum og á festivalum. Soleiðis verður eisini í ár.

**Ein opin leikur**

"Ævintýraferðin er ein samanrenning millum tónleik og sjónleik. Tað er eitt konsept sum krevur, at børnini eru virkin í leikinum. Hetta er ikki ein vanligur sjónleikur. Vit hava sjálvandi ein reyðan trá í leikinum, men leikurin er meiri ein karmur enn nakað annað. Leikurin er ógviliga opin og víður,